# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ester hjá Kjølbro farin

### Ester Kårbø, f. Kjølbro

### 1921-2006



Fríggjakvøldið 10. mars doyði Ester Kårbø, sum búði í Vågslia við Bergensfjørðin 84 ára gomul.

Ester varð fødd 2. oktober 1921 á Biskupsstøð í Klaksvík. Foreldur hennara vóru Karen Sophie, f. Biskopstø, ættað haðani av garði, og Jógvan F. Kjølbro, ættaður úr Gerðum, og kendur vinnulívsmaður. Tey giftust í 1909 og búsettust á Biskupsstøð.

Karen og Jógvan Kjølbro fingu fimm børn: Ewald (1913-1979), Oda (1915-2003), Poul Nolsøe (1917-1977), Kitty (1920- ) og Ester. Kitty, sum verður 86 í summar, býr í Keypmannahavn, har hon hevur verið síðani fyri 2. heimsbardaga.

Ester var sum blaðung í handlinum hjá foreldrunum, fór síðan saman við Kitty til Danmarkar á skúla, men kom aftur fyri kríggið og fór aftur í handilin.

Í 1941 giftist hon norskum flóttarmanni, Ingebrigt Kårbø, ættaður av Holsenøy beint norðanfyri Bergen. Hann kom við einum tí fyrsta norska flóttarfólkaskipinum, Silva, sum higar komu undir krígnum, tey flestu til Klaksvíkar. Annar maður sum var við, og eisini giftist í Klaksvík, var Knút Brandal, sum giftist Honnu hjá Binu og Johs. úr Hvalvík.

Ester og Kårbø, sum hann altíð varð nevndur í Føroyum, búðu mest úti á Oyri, har elsta barnið er føtt. Seinni búðu tey á Varpinum í húsunum, sum vóru sunnanfyri snikkaravirkið.

Eftir kríggið fór familjan aftur til Noregs og búsettust í Bergen, har Kårbø tók uppaftur starv sítt sum handilsmaður við fiski. Hann handlaði nógv við Føroyar, eitt nú við agni og sildatunnum, tá tann tíðin var, og sum vera man nógv við Kjølbro. Ester var heimaarbeiðandi øll árini, har hon passaði familju, hús og heim.

Tey bæði varðveittu tætt samband við Føroyar, og óteljandi vóru tær ferðir, tey bæði gjørdu hendavegin. Kårbø varð føroyavinur burturav og sera væl dámdu teimum at fáa vitjan úr Føroyum, eisini av fólki sum vóru á gjøgnumferð um Bergen, hvønn vegin tað so var.

Saman við skyldkonu síni, Mariu hjá Óla í Skúla, sum eisini var gift í Bergen, vóru tær báðar ofta á støð, tá Smyril ella Norrøna komu, fyri at hyggja, um onkur kenningur úr Føroyum var við. Og frá hugnaliga heimi teirra, fyrst í Hellebakken, seinni nógvu árini í Vågslia við vakrast hugsandi útsýni yvir Bergensfjørðin, kundu tey bæði Kårbø eygleiða føroyska ferðaskipið koma og fara.

Í 2002 hevði Ester ta gleði saman við børnum sínum at verða bjóðað til Klaksvíkar av býráðnum at vera hjástødd, tá standmyndin av pápa hennara, J. F. Kjølbro, bleiv avdúkað í Biskupsstøðtúni. Kårbø doyði fyri nøkrum árum síðan, og á heysti í 2003 var Ester heima fyri seinastu ferð. Tá segði hon øllum farvæl og segði seg ikki koma aftur. Og soleiðis varð. Seinastu 2 árini, rørslutarnað og veik, búði hon á røktarheimi, Åstveit Sykehjem, har hon nú doyði, troytt og mett av døgum, 84 ára gomul.

Eftir Ester og Kårbø sita trý børn, tvær døtur og ein sonur. Øll eiga tey familju og búgva í Bergen. Kari er lærarinna, og Elsa er sjúkrasystir. Jegvan situr í góðum álitisstarvi í norsku oljuvinnuni. Ester eigur fimm ommubørn og eisini fleiri langommubørn.

Jarðarferðin var mikudagin í Bergen.

## Far verøld, far væl ...... ella ?

*Barn føtt í fjósi - Óðin í Valhøll;*
*trúgv okkar her skiftir skap,*
*pallmyndin broytist, tað sanna vit øll,*
*tá vit gjørdust kristin, hvarv Ginnungagap*).*

*Spjadd runt um heimin eru tað fleiri,*
*sum í teirra hjørtum tó eiga ein gud,*
*ið ikki er okkar, men teimum er meiri*
*enn hann, sum á sinni fall okkum í lut.*

*Trúgvandi sálir frá Mekka til Havnar,*
*kveiktar við orkuni sterku og baldu,*
*berjast í blindum um lagnur, sum lavnar*
*fjakka á fold millum trúgvir ótaldu.*

*Á skræðuni trúgvin so ymisk er litað,*
*gudum vit tæna við hørpunnar slátt,*
*um gudur vár sannur for øll er, vit vita*
*ei, fyrr enn vit trína um hansara gátt.*

*Nøkur, tey fjala sítt andlit og yndir,*
*onnur tey klæða seg við ein kalott,*
*og so eru tey, sum seg straffa for syndir,*
*sum bíbil teim bannar við Mós´lógar mátt.*

*Tað vera man verðin, sum okkum øll dregur,*
*og neyvan Várharra, sum vil oss so væl,*
*hann tjóðleysur, ósæddur millum oss veður,*
*at tryggja at skapan tó er, sum hon skal.*

*Ja, inni har trúgvirnar mongu tær búgva,*
*har sumt kennist sannlíkt og annað er fjas,*
*har halgimenn hoyrast og íspeglar lúgva,*
*har hoyggjar vár trúgv tó hitt himmalska gras.*

*Muhammed, Kristus, Jahve og Buddha,*
*allir teir stríðast um trúgv móti sær,*
*høvdu tó tollyndi vit sett á odda,*
*áttu í felag vit gudgivnan garð.*

*Av hugmóð er heimur, har menniskju hata*
*í navni hins himmalska Gud,*
*í meðan tey næsta sín dagliga glata*
*og kanna sær himinin allan í lut.*

*Men ringast tó vera tað má av tí ljóta,*
*tá sakleys vit lemja við bíbil í hond,*
*tá trúnna vit traðka og boðtalvur bróta,*
*tá sjálv vit tey døma og leggja í bond.*

*Ja, vit sum í heiminum dvølt hava bil,*
*meðan øldir um himnahválv spela,*
*vit eiga sum kristin at brúka várt skil,*
*so Himin vit eiga í felag.*

*Um tolin vit øll tamdu tanka og trúgv*
*sum Himin oss heiðan læt hóma,*
*tá bygdu um bládýpir saman vit brúgv*
*so kristin vit vóru við sóma.*

*) Ginnungagap: Í norrønu gudalæruni verður sagt frá um eitt dýpi millum kulda- og tokuheimin, Niflheim, í norðri og eldheimin, Muspilheim, í suðri. Har ísurin úr Niflheimi møtti eldinum úr Muspilheimi var altíð mjørki. Úr hesum mjørkanum kom jatnin: Ymer.

**Petur Martin Petersen**

## Í einum ørkymlaðum heimi

Í einum ørkymlandi og ørkymlaðum heimi havi eg við íblástri úr danskari yrking skrivað viðhongdu 12 ørindi, sum kanska eru okkum øllum viðkomandi, nú trúarrørslur og/ella menniskju trampa á virðunum hjá hvørjum øðrum, og humanisman hoknar, har vitloysið fær rásarúm til at hóroyggja sær tvørtur um øll siðsemismørk í navni hins Hægsta hjá ymsum fólkasløgum.

12-talið gongur aftur í at kalla øllum trúarrætningum jarðar, so viðhongda versini eru eisini 12 í tali, sum mánðartalið í bæði heidna og kristna árinum, sum Jákups synir og Juda ættarbólkarnir, sum teir 12 limirnir í ráðnum hjá buddistiska Dalai Lama, sum tey tólv portrini hjá egyptarum til undirheimin, har sólgudurin Ra býr, meðan nátt er, og ikki at gloyma Herodot, sum sigur okkum frá um12 gudar og gudinnur á Olympos og teir tólv titanarnar hjá Hesiod. Í islam verður talað um teir tólv imamarnar, eftirkomarar Ali, sum ráða yvir teim 12 tímunum, sum ein dagur er. Hjá jødunum eru 12 fruktir á lívsins træi, 12 portur í himnastaðnum, 12 sýnisbreyð í templinum, eitt til hvønn mánaðan í árinum. Hjá keltarunum vóru hjá Karl tí Stóra 12 pallatinarar - reiðmenn - og 12 riddarar um tað runda borðið, og so søgdu kinverjar, at heimur okkara kundi sundurbýtast í 12 greinar, og vit kristnu bera eisini 12-talið við okkum, eitt nú við 12 apostlum afturat tí, vit eiga av arvagóðsi úr gomlu pakt.

Jú, 12-talið spøkir aftur úr hvørjum heraðshorni jarðar í bæði halgum og verðsligum høpi, so onkursvegna semjast vit øll um hetta snøgga tal, sjálvt um vit ikki duga at semjast um livsins friðarboðskap millum manna.

**Petur Martin Petersen**




## Gospelkonsert í Norðurlandahúsinum

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin 26. mars verður ein stór gospelkonsert í Norðurlandahúsinum.

Tað er fólk í samkomuni Lívdini í Hoyvík, ið skipa fyri konsertini. Umframt Malin Zachariassen, sum kemur úr Svøríki, eru tey luttakandi: Heini Lützen, Anna D. Háberg, Torkil Mørkøre, SigridRasmussen og Petur Háberg. Framførd verða nógv ymisk sløg av tónleiki.

Atgongumerkir á kr. 150,- vera at fáa í Kunningarstovunum í Havn og Runavík og í Norðurlandahúsinum.